**DELL INSPIRON 8200 FARTELDA**
Intel Pentium 4, 1.70 GHz processor. 256 MB RAM. 40 GB harddisk. 15” TFT skerm. DVD og brennari. GeForce4 skermkort. Firewire. Netkort. TV-out. Touchpadmús og trackpointmús. Teldutaska. Farteldan er frá september 2002. Hon er lítið brúkt og í góðum standi. Til sølu fyri DKK 18.000,00. Nýprísur 23.500,00.
*Tlf. 219804*

## Tónleikur

**ROLAND V-DRUMS TIL SØLU**
um nóg gott boð fæst. Hevur eina rúgvu av møguleikum. Væl egnað til lítil høli ella samkomur. Nýprísur uml. 40.000 kr.
*Tlf. 265938*

**MARSHALL FORSTERKARI**
Marshall JCM 900 SL-X forsterkari við Lead 1960 kabinet til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 265938*

**TIL SØLU**
Sony CD-spælari til sølu fyri kr 300.
*Ring á 55 55 53*

**HÁTALARAR TIL SØLU**
Einir sera góðir hátalarar av merkinun Holfi Sten Pearl til sølu.Teir eru gjørdir í Danmark. Til sølu fyri einans 12.000 kr. Les meira um teir á www.holfi.dk. Kunnu hoyrast í Gøtu. Vilja tit vita nærri, so E-maila til Email.Fo_hifi@hotmail.com ella ring
*Tlf. 0045.86602494*

**TIL SØLU**
Luxman forsterkari. Sony CD es model, Sony.minidisk.við 15 minidiskum, Yahama. Dupultur bandspælari. Kenwood Equleisari. Við eru leidningar og annað. Nýprísur 25000 kr. Nú til sølu fyri bert 5800 kr.
*Tlf. 424257*

**SOURROUND ANLEGG**
Føroya nokk størsta og besta sourround anlegg av merkinum Holfi. Forsterkarin: Holfi 5.1 (nýprísur í Danmark 19.998,- kr.). CD-spælari: Holfi Xara NFB-Rex (nýprísur 13.500,- kr.). Hátalarar: Holfi Sten Pearl (nýprísur 13.000,- kr.). Spar 16.500,- kr. 3 ára garanti. Anleggið stendur í Gøtu. Nú til sølu fyri einans 29.999,- kr. Ring ella mail'að
*Tlf. +45 86602494 e-mail: fo_hifi@hotmail.com*

**EG HAVI DANSKAR OG**
og útlendskar fløgur, bæði brúktar og óbrúktar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum.Fax: 0045 86411111
*Tlf. +45 86428627 og +45 26747474*

## Út- & Sjónvarp

**STOVUANTENNA TIL SØLU**
Nýggj stovuantenna UHF/VHF/FM til sølu fyri 350,- kr.
*Tlf. 322142/507404*

## Ymiskt

**NOKIA 9210 FARTELEFON**
Spildurnýggj Nokia 9210 fartelefon til sølu.
*Tlf. 218159*

**HJÁLP**
Er tað nakar, sum flytir til Sjælland og hevur pláss fyri mínum skápi, song, kommodu og spegli? Vinarliga ring
*Tlf. 229819, Anita*

**HAVAGRILL**
Óbrúkt havagrill til sølu fyri 200 kr. Gass havagrill við reg. og gassfløsku til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 421144*

**NOKIA 7250 TIL SØLU**
fyri bert 3.850 kr. Kann taka myndir og mangt annað. Er bert 2 mðr. gomul og í góðum standi.
*Tlf. 261887*

**FJARSTÝRING OG MOTORUR**
Ein Graupner JR fjarstýring við 8 kanalum og ein O.S. max 25F SR motorur til modelflúgvara til sølu fyri 2.000,- kr.
*556491*

**HURÐAR**
v/ karmi, hædd 2 m, breidd 70 og 60 cm.
*Ring á 55 55 53*

**TIL SØLU**
Boksmadrassa, 1,20 breið, til sølu fyri 1500 kr. Panasonic EB-GD75 fartelefon 1 1/2 ár, silvur og blátt display, til sølu fyri 1400 kr ella boð.
*Tlf. 228048*

**FRÁ ELDRAFELAGNUM »NÓN«**
Eldrafelagið »Nón«, Saltangará, fer útferð til Norðoyggjar, sunnudagin 10. august. Farið verður frá Sjómansheiminum í Runavík kl. 8.45. Tey, ið ynskja at verða við, verða biðin um at siga frá á tlf. 447718 ella 447073 innan 7. august
*Nevndin*

**NOKIA 440 MNT 450 FARTELEFON**
til sølu, góð í hava og í báti. 1.000 kr.
*Tlf. 269069*

**MOBIL TIL SALG**
Sony Ericsson T200 er kompatibel med CommuniCam MCA-10 View, digitalkamera. Tripleband, WAP 1.2.1 (Nypris dec '02, 1995,- kr.) til salg for 1200,- kr. Ring på
*Tlf. 503130*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Ein defekt Siemens M35i, 1 nýtt + 1 brúkt battarí (til C35, M35 og S35), 2 ladarar, headsett og taska. Verður selt samlað fyri 500,- kr ella hvør sær.
*Tlf. 322142/507404*

**TIL SØLU**
Ericsson T29S fartelefon til sølu. Sær út sum nýggj. Ein orginal taska fylgir við. Prísur 1200 kr. Ring
*Tlf. 373086/373769*


FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvu, adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

Sosialurin




*Zuma og liðfelagarnir úr FCK fingu ikki stórvegis burturúr, tá OB vitjaði um vikuskiftið*

# OB ætlar at blanda seg uppí

**Todi Jónsson eigur framvegis fyrsta málið til góða í nýggja kappingarárinum, og Jón Rói Jacobsen hevur tvær tær fyrstu ferðirnar sitið á beinkinum allar 90 minuttirnar**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Næstsíðsta vikuskiftið fór fótbólturin í Danmark á rull aftur í góðveðrinum, og tað var eins gott summarveður, tá ið annað av teimum 33 umførunum, sum skulu fáast frá hondini, áðrenn tað verður greitt, hvør verður meistari, varð avgreitt í vikuskiftinum.

Longu leygardagin hevði FCK, sum í fyrsta umfarinum hevði vunnið 2–0 í torføra útidystinum í Aalborg, vitjan av OB. Undan hesum kappingarárinum hevur verið spátt, at OB, sum í fyrsta umfarinum á heimavølli vann 2–0 á uppflytarunum úr Frem, kanska skal gerast ein hóttan fyri Brøndby og FCK.

Ítróttarstjóri í OB er Kim Brinck, sum áður hevur verið venjari í FCK. Í Noregi er Rosenborg einasta stórliðið. Í Skotlandi eru tað Glasgow feløgini Celtic og Rangers. Í Danmark hevur gongdin seinastu árini alt meiri verið tann, at FCK og Brøndby hava lagt sjógv millum seg og hini. Hetta ætla teir í Odense at gera nakað við, og leygardagin sást væl í Parkini, at teir eru komnir fittan tein av vegnum. OB vann 4–2 á FCK, sjálvt um gestinir frammanfyri 15.281 áskoðarum vóru undirmannaðir síðsta stóra hálva tíman, tí Nikolai Stokholm, sum er ein av fleiri nýggjum spælarum í felagnum (teir hava keypt hann í AB) sá gult fyri aðru ferð og harvið reytt.

OB fekk fulla úrtøku burturúr trimum teimum fyrstu møguleikunum, sum teir høvdu. FCK setti leingi dám á, tí álopsparturin var á góðari leið, men verjuspælararnir og ikki minst málverjin vóru ikki so sannførandi, sum tað kann roknast við. Zuma javnaði til 1–1 miðskeiðis í 1. hálvleiki við góðum skoti av brotsteigarmarkinum, og Peter Møller minkaði um munin til 3–2 tveir minuttir eftir, at hann í 63. minutti hevði loyst Toda Jónsson av. Hann stóð minni enn ein fót frá málstrikuni, tá ið hann fekk fatur á returbólti. So varð roknað við, at FCK skuldi leggja trýst á fyri at javna, men málverjin hjá teimum metti heilt skeivt, tá ið hann fór úr málinum, og so vann OB 4–2.

Eins og í Aalborg næstsíðsta leygardag spældi Todi væl, og hann hevði onkrar góðar royndir ímóti málinum, men tað eydnaðist honum ikki at fáa mál. Í Aalborg stútaði FCK bæði málini eftir deyðbóltsstøður, og tá vóru tað miðverjin Bo Svensson og miðvallarin Thomas Røll, sum vóru málskjúttar.

## Jón Rói á beinkinum

Michael Laudrup hevði seytjan spælarar við til útidystin í Valby ímóti Frem, sum var fyrstu ferð á heimavølli í bestu deildini, síðani teir í 1993 fóru a húsagang og vórðu fluttir niður í Danmarksseriuna.

Jón Rói Jacobsen var millum teir seytjan, men hann var á beinkinum allar 90 minuttirnar. 20 ára gamli Jonas Kamper, sum hevur havt ilt við at spæla seg til fast pláss, skoraði bæði Brøndby málini. Hitt fyrra stúaði hann í 5. minutti, og hitt seinna skoraði hann við góðum skoti, tá ið tað bara restaðu fýra minuttir. Á heimavølli ímóti Herfølge næstsiðsta sunnudag var hesin Jonas Kamper á beinkinum. Hann skoraði, tá ið hann varð skiftur inn. Harvið legði hann lunnar undir 2–0 sigurin ta ferðina, og hesa ferð hevði hann fingið pláss millum teir fyrstu ellivu.

## Turbolensur í Århus

Mesta fótbóltsprátið – í hvussu so er tað, sum ikki beinleiðis hevur við fótbóltsspælið at gera – hevur síðstu vikuna verið um AGF. Liðformaðurin hjá teimum, Brian Steen Nielsen, misti bindið undan næstsíðsta vikuskifti, tí hann undir venjing fyri tveimum vikum síðani skuldi hava skallað ein av viðspælarunum. Nýggi liðformaðurin, Leon Andreasen, hevndi seg sunnudagin ímóti FC Nordsjælland, og so sá hann reytt.

Talan var um sannan dramatikk. Eisini ein FC Nordsjælland spælari varð rikin av vøllinum í Århus. Brian Steen Nielsen javnaði til 1–1 upp á brotsspark fyri AGF, og tríggjar minuttir undan leikloki hevði hann við nýggjum brotssparki møguleika at skora sigursmálið fyri AGF. Men ta ferðina sendi hann bóltin skeivu megin stólpan, og í næsta álopinum skoraði FC Nordsjælland, og so tóktist alt at liggja í knúsi fyri annars illa sperda AGF. Men tá ið 93 minuttir vóru farnir, skoraði AGF til 2–2, og so var dagurin bjargaður í Århus.

Viborg og Esbjerg spældu 1–1. Tommy Bechmann javnaði til 1–1 fyri Esbjerg við rimmar langskoti. Hesin ungi maðurin sigst vera í kikaranum hjá fleiri útlendskum feløgum, men enn hevur Esbjerg einki ítøkiligt boð fingið. Tað eru teir neyvan harmir um, tí hann er góður hjá Esbjerg at hava, og so leingi, sum hann spælir so væl, sum hann nú hevur gjørt, so økist søluprísurin.

AaB reisti seg eftir vónbrotið á heimavølli ímóti FCK. Teir vóru í Gladsaxe, har AB, sum hevur mist meiri enn helmingin av spælarunum, sum teir høvdu á liðnum í fjør, tapti 2–0. Herfølge hevði eftir tapið í fyrsta umfarinum í Brøndby, møguleika at reisa seg á heimavølli, men teir tóku ikki av. FC Midtjylland legði seg á odda beinanvegin. So mistu teir ein mann, men hóast Herfølge hevði yvirvág alla tíðina, so fingu teir einki burturúr.



# HEILSANIR



**Góðu omman og abbin**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum og alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Pauli og Helgi**





**Góði fitti Dan Helgi**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 2. august. Takk fyri eitt fantastiskt ár saman.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði Heri**
Hjartaliga tillukku við degnum 31. juli og 1.000 takk fyri kakuna.
**Heilsan starvsfelagarnir**



**Góði elskaði Karl!**
Hjartaliga tillukku á 4 ára føðingardegnum, 5. august.
**Kærar heilsur**
**Mamma, babba, Mathias og Súni**



**Góði elskaði Súni!**
Hjartaliga tillukku á 3 ára føðingardegnum, 4. august.
**Kærar heilsur**
**Mamma, babba, Mathias og Karl**

Heilsan við tí runda degnum 2. august. Her hevur tú fullar hendur
**Heilsan starvsfelagarnir**





Tillukku við degnum 2. august. Ja her hevur tú nógv um oyruni.
**Heilsan starvsfelagarnir**



**Góði maður!**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum.
**Ynskir kona tín**

**Góða Armgarð!**
Nú dagurin hann komin er,
men hvat – tú enn heilt væl teg ber.
Tung sporini munnu kennast í dag,
og helst ert tú í sera ringum lag.
Vit eru heppin, at feriu tú hevur,
vónandi onkur eitt klemm tær gevur!
Hjartaliga tillukku
við teimum 40 árunum.
**Starvsfelagarnir í Hornabø**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góður við meg.
**Lítla Emma**



## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.........................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«